## Eiga at útseta evruna





Danski búskaparfrøðingurin Niels Jensen, sum arbeiðir hjá fyritøkuni Absolute Return Partners í London, skrivar í teirri seinastu útgávuni av Økonomisk Ugebrev, at danska stjórnin eigur at útseta ta ætlaðu fólkaatkvøðuna um at seta evruna í gildi ístaðin fyri krónuna. Niels Jensen skrivar, at altjóða fíggjarkreppan hevur rakt evrulondini sera ymiskt, og at tað er ein veikleiki fyri skipanina. Hann nevnir, at Týskland er sloppið rímiliga væl burtur úr kreppuni higartil, meðan lond sum Italia, Spania og Grikkaland eru meint rakt. Danmark eigur ikki at fara upp í hetta samstarvið nú, skrivar Niels Jensen.

## Vinnan laga seg til veruleikan

Í Grønlandi tekur flokkurin Inuit Ataqatigiit undir við tilmælinum hjá fiskivinnunevndini um at skerja talið á fiskiførum og fiskimonnum. Ane Hansen, sum er framsøgukvinna hjá IA í fiskivinnumálum, sigur við KNR, at grønlendska fiskivinnan noyðist at laga seg eftir veruleikanum. Er minni fiskur at fiska, noyðast vit at hava færri fiskimenn, sigur hon. Ane Hansen leggur afturat, at tað er umráðandi, at fiskimenninir vita, hvar teir flóta, so teir kunnu leggja sínar ætlanir minst eitt ár fram í tíðina.

# Vágbingar vilja ikki ganga í takt

**Nú kommunurnar í Suðuroy aftur hava sett samanlegging á dagsskrá, stendur Vágs Býráð framvegis fast við, at møguleikin fyri at leggja Suðuroy í tvær kommunur, skal kannast**

KOMMUNUSAMANLEGGING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




*Kommunurnar í Suðuroy hava tosað um at leggja alla oynna í eina kommunu, men Vágs Býráð tvíheldur um, at fyrimunir og vansar við at leggja oynna saman í tvær kommunur, skal eisini kannast og nú fer Vágs Býráð at tosa við hinar kommunurnar í syðru helvt í Suðuroy fyri at vita, um áhugi er fyri tí*

Vágbingar taka framvegis ikki glaðbeintir undir við, at øll Suðuroy verður løgd saman í eina kommunu.

Tað er greitt eftir býráðsfund í Vági í gjárkvøldið.

Hesar seinastu mánaðirnar hava kommunurnar í Suðuroy tosað um at seta ein arbeiðsbólk at stinga eina gongda leið út í kortið, so at øll Suðuroy kann verða løgd saman í eina kommunu.

Áður hava kommunustýrini á Tvøroyri, í Hovi og í Porkeri tikið undir við ætlanini og avtalað er, at hinar fýra kommunurnar skuldu taka avgerð um málið, so hvørt tær høvdu fund.

### Ikki í takt við hinar

Og í gjárkvøldið varð so fundur í Vágs Býráði, har kommunusamanlegging var á skránni.

Vágs Býráð hevur áður tvíhildið um, at leggja Suðuroy saman í tvær kommunur fyrst, ístaðin fyri eina og so at arbeiða víðari haðani frá.

Og á fundinum í gjárkvøldið kom fram, at vágbingar vilja ikki ordiliga ganga í takt við hinar kommunurnar, tí teir halda framvegis fast um, at teir fara ikki glaðbeintir upp í eina felags Suðuroyar Kommunu.

Vágs Kommuna tekur undir við, at ætlaði arbeiðsbólkur verður settur at viðgera eina samanlegging.

Men samtyktin er treytað av, at arbeiðsbólkurin skal eisini kanna møguleikarnar fyri at leggja Suðuroy saman í tvær kommunur og at kanna fyrimunirnir og vansarnar við tí við.

Tað, sum Vágs Býráð í so fall hugsar sær, er, at tær fýra syðstu kommunurnar, Sumba, Vágur, Porkeri og Hov, leggja saman í eina kommunu og at hinar tríggjar, Tvøroyri, Fámjin og Hvalba leggja saman í eina.

Men tað kom eisini fram á býráðsfundinum í Vági, at tað er neyðugt at tosa við hinar kommunurnar í syðru helvt fyri at vita, um áhugi yvirhøvur er fyri at leggja tær syðru kommunurnar saman í eina kommunu.

- Eru hinar kommunurnar í syðru helvt í Suðuroy ikki sinnaðar at leggja saman við Vági í eina kommunu, er støðan ein onnur, sum so má takast til viðgerar.

Men í Vágs býráði halda tey, at tað er eitt øgiliga víttgandandi stig at taka, at leggja alla oynna saman í eina kommunu í einum høggi.

### Ikki skundast ígjøgnum

Vágs Býráð er eisini fullsamt um, at ein møgulig kommunusamanlegging í Suðuroy skal ikki skrumblast ígjøgnum.

Býráðslimir síggja fyri sær, at verður talan um samanlegging, verður tað galdandi frá 1. januar 2013, tá ið aftur eitt nýtt valskeið hjá kommunustýrunum byrjar.

Býráðslimir í Vági eru sostatt av teirri áskoðan, at skulu kommunur leggja saman, skulu tær brúka alt hetta valskeiðið til at fyrireika samanleggingina.

Men tað, sum Vágs Býráð eisini hugsar um, er, at landsstýriskvinnan í innlendismálum, Annika Olsen, hevur sett arbeiðsbólk at kanna kommunubygnaðin.

Og Vágs Býráð staðfestir, at tað kann ikki koma upp á tal at leggja kommunurnar saman, fyrrenn tey kenna niðurstøðuna hjá hesum arbeiðsbólkinum, sum skuldi koma á ólavsøku.

- Vit kunnu ikki leggja saman, fyrrenn vit vita, hvat vit leggja saman til, er støðan hjá Vágs býráði.

Býráðslimirnir í Vági eru eisini samdir um, at áðrenn kommunusamanlegging kann koma upp á tal, má eitt munadygt fyrireikingararbeiði gerast, so at tað nágreiniliga verður avtalað, hvussu samanlagda kommunan skal skipast við umsiting, skúlum o.s.fr.

Og í Vágs Býráði eru tað eisini býráðslimir, sum eru púra sannførdir um, at samgongan fer ikki at leggja kommunur saman við lóg.

Tó vóru tey greið yvir, at tað kann samgongan kortini gera óbeinleiðis við at leggja so nógv málsøki undir kommunurnar at umsita, at tær noyðast at leggja saman fyri at klára at lyfta uppgávuni.

### Ikki fyri einhvønn prís

Í prátinum um kommunusamanlegging í Suðuroy, vakti borgarstjórin í Vági, Kirstin Strøm Bech, størst ans í heyst, tá ið hon kunngjørdi, at hon hevur skift støðu og nú tekur undir við, at Suðuroy verður ein kommuna.

Men á býráðsfundinum í Vági í gjár minti hon eisini á, at hon hevur gjørt greitt, at tað skal ikki vera fyri einhvønn prís.

Og hon helt, at tað er neyðugt at kanna út í æsir, hvat kommunusamanlegging inniber og hon tekur eisini undir við, at allir møguleikar verða kannaðir, bæði Suðuroy sum ein kommuna og sum tvær kommunur.

Og eisini hon vil hava at vita, hvat úrslit arbeiðsbólkurin hjá landsstýrinum kemur við.

# Granskingardepilin fór um mark

Í Vágs Býráði eru tey misnøgd við, at tað er Granskingardepilin fyri samfelagsmenning, sum hevur stig til at leggja alla Suðuroy saman við eina kommunu

Í heyst tók Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning, stig til at fáa kommunurnar í Suðuroy at viðgera málið um at leggja alla Suðuroy saman í eina kommunu.

Tá varð avrátt, at bíða til kommunuval hevði verið, tí mett var, at tað var rættast, at tey nývaldu kommunustýrini tóku málið upp.

Og nú kommunustýrini aftur eru skipað av nýggjum eftir valið í heyst, kallaði Granskingardepilin aftur til fund at umrøða kommunusamanlegging. Tað, sum Granskingardepilin ætlar at skipa fyri, at ein arbeiðsbólkur verður settur at arbeiða við málinum.

Í innkallingini hevur Granskingardepilin skrivað, at tað varð tikið sum givið, at tey kommunustýrini, sum møttu á fundinum, eisini taka undir við, at Suðuroy verður løgd saman í eina kommunu.

Hetta er fallið býráðslimum í Vági fyri bróstið og fleiri teirra átalaðu Granskingardepilin fyri at taka eina so avgjørda støðu upp á nakkan á kommununum.

Støðan hjá Vágs Býráði er, at tað eru kommunurnar sjálvar og ikki Granskingardepilin, sum skal gera av, um kommunur skulu leggja saman og, hvussu tær skulu leggja saman og her hildu býráðslimir í Vági, at Granskingardepilin var farin út um mark.

Men tey eru kortini sinnað at viðgera málið og at geva hinum kommununum eitt svar

Tá ið øll kommunustýrini hava tikið støðu til spurningin, skulu tey hittast aftur at tosa um, hvussu farast skal fram víðari.

Vágs Kommunu hugsar sær, at tað verða kommunuskrivararnir, sum manna arbeiðsbólkin og at teir so fáa sær ein uttanveltaðan samskipara afturat. Men, sum tað sæst í hinari greinini, vil Vágs Býráð eisini kanna møguleikarnar fyri tveimum kommunum í Suðuroy.

-áki-